# Verkfall í Grikkalandi

Tað hevur kvirt á nógvum arbeiðsplássum í Grikkalandi í dag, tí meiri enn tríggjar milliónir fólk hava lagt arbeiðið niður fyri at mótmæla spariætlanunum hjá stjórnini. Ein av ætlanunum hjá stjórnini er at spara í teimum almennu lønunum, og tað hevur gjørt, at tey almennu starvsfólkini sita við hús í morgun. Harafturat hava fleiri fakfeløg á tí privata arbeiðsmarknaðinum eisini lagt arbeiðið niður. Arbeiðssteðgurin rakar allar almennar skrivstovur, sjúkrahúsini, skúlarnar og bankarnar. Harafturat rakar arbeiðssteðgurin samferðsluna á landi, sjógvi og í luftini.



# Heryvirmenn í fongsul

Í Turkalandi hevur ein dómstólur varðhaldsfongslað sjey týðandi heryvirmenn, sum samstundis eru formliga skuldsettir fyri at hava havt ætlanir um at koyra stjórnina frá. Tað var í 2003, at tað bleiv avdúkað, at partar av herinum høvdu ætlanir um eitt hernaðarkvett, og umleið 50 heryvirmenn vórðu tiknir. Nú kemur málið fyri rættin, og dómstólurin í Istanbul hevur avgjørt, at fýra ovastar í herflotanum og tríggir í herinum skulu í varðhaldið at sita. Turkiska ákæruvaldið sigur, at fleiri aðrir heryvirmenn eru til avhoyringar í hesum døgum.

# Avtala vantar um tann-røkt

**Sjóar kommuna arbeiðir við at fáa fasta avtalu við tannlæknan í Hvalvík, tí tað er so trupult at fáa tannlæknar**

TANNRØKT
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Vestari armur av Skálafjørðinum hevur ongan tannlækna, og Sjóar kommuna roynir av øllum alvi at finna eina loysn, tí børnini mugu sleppa til tannlækna.

Á tannlæknastovuni á Skála arbeiðir ein tannrøktari, men tannrøktarin kann ikki loysa allar uppgávurnar. Er tað neyðugt fyri børn at sleppa til tannlækna, verður í hvørjum einstøkum føri gjørd avtala við Oddmar Færø, sum arbeiðir sum tannlækni í Hvalvík.

- Nú royna vit at fáa eina fasta avtalu við Oddmar Færø, tí hóast vit hava søkt, hevur ikki eydnast okkum at fáa okkara egna tannlækna, sigur Arthur Johansen, borgarstjóri í Sjóar kommunu.

Vónir eru tó um at fáa ein tannlækna, tí ein strandingur er nýliga útbúgvin sum tannlækni, men viðkomandi kann ikki arbeiða sjálvstøðugt beinanvegin.



*Jógvan Eli Dam og Tórur Mikkelsen ætla sær út umlandið at lýsa landið, men okkurt verður eisini at frætta úr Havn*
*Jens Kristian Vang*

# Fara út í hvønn krók

**Í staðin fyri at gera ítróttarsendingina 3-2 í sjónvarpinum, er Tórður Mikkelsen nú farin undir nýggja eina sendirøð saman við myndamanninum Jógvan Eli Dam. – Vit fara út um landið og taka upp gerandisligar spurningar, sum viðkoma fólki á staðnum**

SJÓNVARP
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Tórður Mikkelsen og Jógvan Eli Dam í sjónvarpinum eru fegnir. Teir løgdu uppskot fyri programmleiðsluna um at gera sendingar við at fara út um landið at tosa við fólk, og leiðslan tók teir upp á orðið. Í hvussu er fram til summarið skulu teir brúka alla sína arbeiðstíð til at gera hesar sendingar, sum hava fingið heitið Frætt og fregnað.

Sosialurin vitjaði teir í morgun í sjónvarpinum. Ætlanin var at fara við tyrluni út til Skúvoyar, men veðrið var heldur ivasamt.

- Tað hevði verið deiligt at farið í dag, tí tað er so ljóst, og sólin skínur, men vit eru so stýrd av veðrinum, sigur myndamaðurin Jógvan Eli Dam.

## Hava royndirnar

Tórður Mikkelsen hevur á áttanda árið gjørt ítróttarsendingina 3-2, men nú er hann givin við tí. Ítróttur hevur framvegis hansara stóra áhuga, men hann hevur hug at royna nakað annað aftur, og so verður ikki so galið ikki longur at vera bundin av arbeiði hvørt vikuskifti.

Eina ferð fyri langari tíð síðan gjørdu Tórður Mikkelsen, Zacharias Hammer og Jógvan Eli nakrar fáar sendingar við heitinum Frætt og fregnað, og teir báðirtaka nú táttin upp aftur eftir nøkulunda sama leisti.

- Vit ætla okkum at ferðast runt í landinum og taka ymiskar spurningr, sum hava týdning fyri tey fólkini, vit tosa við, sigur Tórður Mikkelsen.

## Fyrst smápláss

Til ta fyrstu sendingina gjørdu teir ymiskar samrøður í Nólsoy, og allar sendingarnar verða settar saman soleiðis, at eitt pláss er útgangsstøði, sum vent verður aftur til nakrar ferðir. Sendingin fer at hava nakrar samrøður gjørdar á hesum plássi, og inn ímillum hesar samrøður kemur ymist annað. Her kann nevnast, at í hvørjari sending fara Solby Eliasen og Hallur Helmsdal at hava eitt innslag um ymist skapandi virksemi.

Tórður Mikkelsen og Jógvan Eli Dam hava í sínum arbeiði ferðast nógv kring landið, og teir kenna tí fólk allastaðni. Tað var eisini Tórður Mikkelsen, sum í sínari tíð byrjaði við morgunsendingini í útvarpinum, har fólk fingu møguleikan at sleppa fram at mikrofonini og tosa um gerandislig mál.

## Fyrikomandi fólk

- Tað er nógv lættari nú, enn tað var áður, at fáa fólk at stíga fram, men tað gongur verri at fáa kvinnurnar at tosa. Eg skilji ikki, hví tær so ofta aftra seg, um tað er av smædni ella tær hava størri sjálvkritikk, sigur Tórður Mikkelsen.

Honum hevur altíð dámt væl at tikið upp fólkslig evni. Evni, sum lýsa gerandisdagin hjá fólki, og sum ikki vanliga verða umrødd í sjónvarpinum. Atfinningarsemi verður ikki tað, sum fer at merkja sendingarnar.

Sum myndamaður gleðir Jógvan Eli Dam seg nógv at koma meira út um landið at taka myndir, tí náttúran er so vøkur, og ikki minst spennandi er nú ljósspælið í kavanum.

- Okkara mál er at lýsa landið, eisini i myndum, siga teir báðir.

Sendingin Frætt og fregnað verður send annað hvørt fríggjakvøld. Henda sendingin og Refleksjón vera sendar upp á skift fríggjakvøld.

Fyrsta sendingin Frætt og Fregnað kemur á grækarismessu.